# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Róðrið aftur í bakborð

Fyrra ABC samgongan setti sítt álit á marknaðarkreftirnar, og Javnaðarflokkurin tóktist hava tað gott við tí. Har sóust ongar sálarkvølir av privatiseringum, skattalættum og afturvendandi útmeldingum um kapitalismunar vælsignilsi. Men so kom syndafallið, altjóða fíggjarkreppan, sum enn einaferð minti allan heimin á kapitalismunar innbygdu veikleikar. Hesuferð vóru brekini so eygsjónlig, at í sjálvari háborgini, USA, varð ásannað, at eingin skipan er sterkari enn veikasta liðið. Bankar og fíggingarstovnar høvdu gjørt sær so dælt av tí stóra frælsi, ið hesir høvdu undir Bush stjórnini, at skipanin skrambladi saman. Svarið hjá Bush var nationalisering.

Eisini europæiskir Javnaðarflokkar vaknaðu við kaldan dreym úr tí bjarnadúri, sum teir vórðu ruraðir í av tølandi neokonservativu og neoliberalistisku tónunum úr Washington. Fyrstur at ressast aftur var Gordon Brown, sum ásannaði, at alt hetta var ein hvørvisjón, eitt yuppieprojekt, sum ikki var lívført. Neoliberalisman hevði onga innbygda moralska bremsu, sum forðaði spekulantunum í at misbrúka tað óavmarkaða frælsi, sum fylgdi við Bushkollveltingini. Úrslitið kenna øll í dag: sorgarleikur oman á sorgarleik, húsagangur, arbeiðsloysi, heimurin í búskaparligari afturgongd og útlit til heimsumfevnandi kreppu verri enn tann, sum reið heiminum í trýatiárunum.

Eisini Javnaðarflokkurin er hvokkin og hevur við landsfundarsamtykt um vikuskiftið gjørt upp við ráðandi neoliberalistiska ideologiska rákið, sum hevur verið í Føroyum síðan stóru kreppuna. Landsfundurin fráboðar, at liberalisman ikki megnar at bera samfelagsvirðunum uppi. Orðarætt staðfestir flokkurin, at støðuga uppáhaldið, at felagsskapurin er eitt haft um beinini á tí einstaka, at sjálvdráttur er betri enn felags stev, at privatiseringar altíð eru av tí góða, og at liberalisman skapar varandi virði og vøkstur, riggaði ikki. Tí eru nú boð eftir hugsjónum, ið kunnu leggja lunnar undir eitt veruligt sjálvberandi vælferðarsamfelag í vøkstri, sigur flokkurin.

Javnaðarflokkurin hevur sostatt eftir ár við ideologiskari líkasælu lagt rórðið í bakborð – back to basic! Tó ikki harðari enn, at altjóða marknaðarbúskapurin skal ganga lið um lið við tí samhaldsfasta samfelagnum - ikki yvirtaka samfelagið. Hetta sigur landsfundur Javnaðarlokkurin er tann sosialdemokratiski arvurin. Her er við øðrum orðum talan um góðan gamlan keynskan blandingsbúskap, og tað er sera áhugavert, tá havt verður í huga, at Keynes mestsum hevur verið bannlýstur, meðan neoliberalistarnir áttu dagskránna. Hetta er veruliga nýggir tónar, og nú verður áhugavert, hvussu flokkurin fer at megna at fáa konservativu skipsfelagarnar at snara samfelagsskútuni á bakborð. Skal farast eftir teimum útsagnum, sum eru komnar eitt nú frá Fólkaflokkinum er hesin neyvan sinnaður at ásanna, at óavmarkaða liberalisman enn einaferð hevur spælt fallit.

**Sosialurin**

# Neyðugt við time-out

**JÓGVAN ARGE**

býráðslimur fyri Tjóðveldi



Floksformaðurin Javnaðarfloksins hevur á landsfundi í vikuskiftinum boðað frá, at flokkurin hevur ikki álit á Tjóðveldi og hvørki kann ella vil samstarva við flokkin.

Javnaðarflokkurin førir seg eisini fram á landsfundinum við einsamallur at taka sær allan heiðurin av teimum glæsiligu úrslitum, sum vit hildu okkum fáa í felag í Tórshavnar býráð í farna valskeiði.

Við hesum og niðrandi umrøðu Javnaðarfloksins av okkara flokki á landsfundinum í huga, eigur Tjóðveldi í Tórshavnar býráð at taka time-out í samgongusamráðingunum og umhugsa støðuna av nýggjum.

Veruleikin er, at stóru frambrotini eru hend grundað á politikkin hjá Tjóðveldi og tað seriøsa politiska arbeiðið, sum flokkurin hevur staðið fyri. Men Javnaðarflokkurin skoraði valsigurin á býráðsvalinum og gjørdist størsti flokkur.

Vit lótu Javnaðarflokkinum leiðsluna í farandi valskeiði, hóast vit vóru størsti flokkur, og mettu at hetta býti tryggjaði eina góða innanhýsis javnvág.

Javnvágin í einum møguligum framhaldandi samarbeiði er skeiklað so markant, at eg og mong við mær hava ilt við at síggja nakra rímiligheit í at halda fram uttan at Tjóðveldi fær tryggjað sær eina munandi betri balanseraða støðu mótvegis Javnaðarflokkinum og borgarstjóranum.

Hann blúgvaðist ikki við at taka sær heiðurin av øllum framdum avrikum undan valinum, og eftir valið kvitterar hansara floksformaður við mest niðrandi umtalu, sum nakar floksformaður hevur givið politiskum samstarvsfeløgum í mannaminni.

Tí hóvar tað mær ikki væl at fara í samgongu aftur við Javnaðarflokkin í Tórshavnar býráð undir teimum treytum, sum í løtuni liggja í kortunum, og eg mæli mínum floksfeløgum í til at taka samstarvið við Javnaðarflokkin í Tórshavnar býráð upp til nýggja umhugsan.

# Sjúkrahúsviðurskifti og Hans Pauli Strøm

**KÁRI KJELNÆS**



Tann sum hevur fylgt eitt lítið sindur við í hesum álvarsmálið sum nú er við at taka seg upp, kann staðfesta, at Hans Pauli Strøm, av álvara hevur lagt seg í teymarnar fyri at fáa niðurlagt Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyðar Sjúkrahús – maðurin skilir heilt einfalt ikki – at tað eru **menniskjalagnur og lív**, hann spælir við.

At niðurleggja eitt vælvirkandi sjúkrahús (les tvey) fyri at upprætta eitt Lazaret! Maðurin má vera fullkomiliga klikkaðar í høvdinum - og eg óttist fyri, hvat hann veruliga hevur í kvittanum.

Øll minnast vit sum eldri eru "Læknastríðið" í Klaksvík í 50 unum – tá Landstýrið sendi danska løgreglu og hundar eftir okkum norðoyingum - og eg eri ræddur fyri, at tað fer at eydnast Hans Paula Strøm – **sum eigur at vera koyrdur frá beinanvegin** – at uppnáa eitt nýtt stríð - hesaferð eitt innanhýsis "borgarastríð" ímillum Havnina/landssjúkrahúsið og restina av landinum.

At kalla Klaksvíkina fyri "Heilsubý landsins" og koma norður at renna og eta sunnan kost, tað er alt í lagið við tí - men at hava ætlanir um at syndrað eitt vælvirkandi sjúkrahús, bæði her og á Tvøroyri, tað verður ikki góðtikið av okkum í útjaðaranum – ikki talingur um – her má nakað gerast, og tað í stundini.

**Og tí spyrji eg – hvar eru okkara politikkarar – var tað ikki teir, sum skuldu verja borg**? Eg undrist yvir, at onki hoyrist frá teimum - oftani fyrr enn óv seint er.

Javnaðarflokkurin hevur væl ikki gloymt valið, sum var í januar, tá teir gingu aftur í atkvøðum og mistu 1 løgtingslim, er ætlanin hjá froksleiðsluni at lata Strømmin koyra í hesum vandavogni sum hann nú hevur sett á skinnaran - so skal leiðslan – sum hevur peikað á hann sum landsstýrismann – VITA og rokna við – at teir hava medábyrgd fyri hesum óskili.

Eitt annað er so tað, at komandi løgtingsval helst verður eitt satt skrædl fyri javnaðin – men orðatakið sigur, at "sum ein reiðir, liggur man".

Fólkið er upplýst í dag, og tey gloyma ikki longur so skjótt, sum politikkararnir halda.

Hetta sum eg her havi nevnt um Javnaðarflokkin er sjálvsagt tað sekundera – tað primera – tað sum í hesum føri kemur í fyrstu rekkju, eru **menniskjalagnurnar og sjálvt lívið**, tí tað er eittans, og ikki til at spæla við, hvørki av landsstýrisfólkum ella nøkrum øðrum.

Tað verður so nógv av peningi nýttur til alt møguligt, **so tað kann ikki vera rætt, at tað ikki eru ráð til eina læknavaktarskipan fyri Norðoyggjar og Eysturoynna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**.

Tað er gott og mangan neyðugt at spara – men **tað er ikki rætt at spara so, at tað stendur um mannalív**.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.